NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

## Ársfrásøgn 2009

## (18. roknskaparár)

**Avrit**

# Innihaldsyvirlit

INNIHALDSYVIRLIT ..... 2
ALMENNIR UPPLÝSINGAR ..... 3
LEIÐSLUFRÁGREIÐING ..... 4
ÁRSFRÁGREIÐING ..... 5
ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA ..... 7
NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR ..... 8
RAKSTRARROKNSKAPUR ..... 9
FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2009 ..... 10
GJALDFØRISFRÁGREIÐING PR. 31. DESEMBER 2009 ..... 11
NOTUR TIL ÁRSFRÁSØGNINA ..... 12

# Almennir upplýsingar

**Stovnurin**

Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin
c/o TAKS
FO-800 Tvøroyri

**Stýrið**

Sigurd Poulsen, formaður
Jógvan Vágsheyg, næstformaður
Gunnvør Dam Jensen
Ingeborg Vinther

**Grannskoðan**

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

## Leiðslufrágreiðing

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn fyri 2009.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og viðtøkum felagsins.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og av útslitinum av virkseminum hjá grunninum.

Ársfrágreiðing og fylgjandi ársfrásøgn verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 17. februar 2010

**Stýrið:**

| | |
|---|---|
| ___________________________ | ___________________________ |
| Sigurd Poulsen, formaður | Jógvan Vágsheyg, næstformaður |
| ___________________________ | ___________________________ |
| Gunnvør Dam Jensen | Ingeborg Vinther |

Ársfrágreiðingin er góðkend á stýrisfundi hin / - 2010

____________________

Fundarstjóri

# Ársfrágreiðing

**Virksemi**
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin er settur á stovn við løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 við seinni broytingum.

Grunnurin hevur til endamáls at tryggja øllum íbúgvum landsins eina arbeiðsmarknaðar-eftirløn.

Fæ grunnsins verður fingið til vega við at allir persónar undir 67 ár rinda grunninum 1,75 % av teirra árligu skattskyldugu inntøku og allir arbeiðsgevarar rinda 1,75 % av útgoldnum A-inntøkunum.

Stovnurin fór undir regluliga útgjaldingar til persónar yvir 67 á tann 1. apríl 1997.

Við virknað frá 1. juli 2009 er lógin broytt soleiðis, at rætturin til eftirløn er knýttur at, hvussu nógv ár ein persónur hevur búð í Føroyum samanlagt millum 15 og 67 ára aldur. Persónurin kann fáa millum 3/40 og 40/40 av fullari eftirløn úr grunninum.

Við broytingini hevur persónurin rætt til eftirløn, tá hann hevur fylt 67 ár, annahvørt hann býr í Føroyum ella uttanlands.

**Fíggjarlig lýsing**
Í árinum er inngjaldið til grunnin frá løntakarum og arbeiðsgevarum minkað við tkr. 6.375. Útgjaldingin til pensjónistar er økt frá tkr. 158.251 til tkr. 182.952.

Aðrar útreiðslur, avsetingar og tap uppá skuldarar eru á leið sama støði sum í undanfarna árið.

Fíggjarligu postarnir netto eru vaksnir við tkr. 52.420 í mun til undanfarna ár, og skyldast hetta serliga staðfestum og óstaðfestum kursvinningi uppá virðisbrøv.

Úrslitið áðrenn fíggjarligar postar gjørdist í 2009 eitt avlop uppá tkr. 64.489 ímóti einum avlopið uppá tkr. 95.601 fyri 2008.

**Úrslit**
Ársúrslitið í 2009 gjørdist eitt avlop uppá tkr. 119.662 ímóti einum avlopi uppá tkr. 98.354 fyri 2008.

Eftir hetta verður eginogn grunnsins pr. 31. desember 2009 tkr. 760.123.

**Hendingar eftir roknskaparlok**
Einki er hent eftir roknskaparlok, ið hevur serligan týdning fyri metingina av ársfrásøgnini.

**Framtíðin**
Vøksturin í inngjøldunum má roknast at minka samsvarandi teirri óvissu gongdini í lønarinntøkum í 2010. Mánaðarliga upphæddin til arbeiðsmarknaðar eftirløn, var fyri 2009 kr. 2.500 pr. mánaða.

Fyri 2010 er útgjaldið sett til kr. 2.600 um mánaðin. Í juli 2009 var farið yvir til brotútgjald, har eisini føroyingar uttanlanda kunnu søkja um at fáa útgoldið arbeiðsmarknaðareftirløn.

Hesi viðurskifti viðføra, at roknast kann við einum størri útgjaldi fyri árið 2010.

Búskapargongdin í Føroyum hevur stóra ávirkan á inngjøldini til grunnin, og eitt vaksandi tal av eftirlønarmóttakarum hevur ávirkan á útgjaldingina.

Samanumtikið verður roknað við einum úrsliti í 2010, sum verður lægri enn í 2009.

**Ognarviðurskifti**
Grunnurin er ein sjálvseigandi stovnur.

Sambært lógini fyri grunnin verður valt eitt stýri at sita fyri grunninum. Hetta stýrið, sum skal hava 4 limir og sum verður valt fyri eitt 3 ára skeið, verður valt soleiðis: Ein limur umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar og stjórin í Landsbanka Føroya.

Landsstýrið tilnevnir formannin í stýrinum.

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til eigararnar av Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum**

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønagrunninum fyri roknskaparárið 2009. Ársfrásøgnin verður gjørd í samsvar við góðan roknskaparsið.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvar við góðan roknskaparsið. Henda ábyrgd ber í sær, at grunnurin støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið skal til fyri at ársfrásøgn kann gerast, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur, og at roknskaparligu metingarnar, sum gjørdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at grunnurin kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2009 og av úrslitinum av virksemi og peningastreymi grunnsins í roknskaparárinum 2009 samsvarandi góðan roknskaparsið.

Tórshavn, hin 17. februar 2010

**NOTA**
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Joen Magnus Lamhauge |
| Løggildur grannskoðari | Skrásettur grannskoðari |

# Nýttur roknskaparháttur

**Alment**
Roknskapurin er greiddur í samsvar við góðan roknskaparsið. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Inntøkur**
Intøka grunnsins – arbeiðseftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75 % av skattskyldugu inntøkuni í 2009 sambært fyribilsskattaskrásetingini, umframt reguleringar av inngjøldum undanfarin ár.

Við roknskaparlok er ikki gjørligt at gera upp inntøkurnar fyri roknskaparárið endaliga, tí grundarlagið undir inntøkunum ikki er tøkt, við tað at sjálvuppgávurnar hjá persónum, sum inntøkurnar verða uppgjørdar eftir, ikki eru tøkar.

Hesar uppgerðir verða tí gjørdar í eftirfylgjandi roknskaparári. Broytingarnar eru tó ikki av eini tílíkari stødd, at tær hava týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarkn. eftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75 % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2009.

**Áogn**
Skuldarar eru virðismettir við frádrátti av møguligum tapsvanda, grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

**Lánsbrøv og partabrøv**
Lánsbrøv og partabrøv eru upptikin til kursvirðið við endan av roknskaparárinum.

**Tíðaravmarkingar, áogn**
Upphæddin umfatar útreiðslur í árinum, sum viðvíkja næsta roknskaparárið.

**Skattur**
Grunnurin hevur, vísandi til løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum, ikki skattskyldu.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2009 | *2008 tkr.* |
|---|---|---|---|
| Nettoinntøka........................................................................ | 1 | 252.417.975 | *258.493* |
| Útgoldin arbeiðsmarknaðareftirløn.................................. | | -182.952.125 | *-158.251* |
| Aðrar útreiðslur................................................................ | | -2.858.153 | *-2.330* |
| Avsetingar og tap uppá skuldarar.................................... | 2 | -2.118.522 | *-2.311* |
| | | **64.489.175** | ***95.601*** |
| Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti................... | 3 | 10.645.460 | *-23.130* |
| Ikki staðfestur kursvinningur/tap...................................... | 4 | 14.405.531 | *-427* |
| Rentuinntøkur.................................................................. | 5 | 30.121.588 | *26.310* |
| | | **55.172.579** | ***2.753*** |
| **Ársúrslit**........................................................................ | | **119.661.754** | ***98.354*** |
| **Býti av úrsliti:** | | | |
| At flyta til næsta ár .......................................................... | 7 | **119.661.754** | ***98.354*** |

# Fíggjarstøða pr. 31. desember 2009

| | Nota | 2009 | *2008* |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| *AKTIV* | | | |
| Áogn | 6 | 16.700.905 | *15.823* |
| Tíðaravmarking | | 16.267.295 | *15.769* |
| **Áogn íalt** | | **32.968.200** | ***31.592*** |
| Lánsbrøv og partabrøv | | 513.334.993 | *388.283* |
| Tøkur peningur | | 215.724.487 | *222.054* |
| **Íalt** | | **729.059.480** | ***610.337*** |
| **Umferðarfæ í alt** | | **762.027.680** | ***641.929*** |
| **AKTIV Í ALT** | | **762.027.680** | ***641.929*** |
| *PASSIV* | | | |
| **Eginogn** | 7 | **760.123.093** | ***640.461*** |
| Ov nógv innkravd arbeiðsmarknaðargjøld | | 191.210 | *191* |
| Onnur skuld | | 1.713.377 | *1.277* |
| **Skuld í alt** | | **1.904.587** | ***1.468*** |
| **PASSIV Í ALT** | | **762.027.680** | ***641.929*** |
| Møguligar aðrar skyldur | 8 | | |

# Gjaldførisfrágreiðing pr. 31. desember 2009

| | **2009** | ***2008*** |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| Ársúrslit | 119.661.754 | *98.354* |
| Broytingar í ogn og skuld grunsins: | | |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, arbeiðsgevarar | -274.439 | *-775* |
| Arbeiðsmarknaðargjøld, løntakarar | -603.728 | *-221* |
| Tíðaravmarkingar | -497.935 | *-3.777* |
| Ov nógv innkravt arbeiðsmarknaðargjald | 0 | *0* |
| Onnur skuld | 436.741 | *352* |
| Gjaldførisúrslit fyri árið | 118.722.392 | *93.934* |
| Gjaldførið pr. 1. januar | 610.337.088 | *516.403* |
| Gjaldførið pr. 31. desember | **729.059.480** | ***610.337*** |

**Sundurgreining av gjaldføri:**

| | | |
|---|---|---|
| Lánsbrøv og partabrøv | 513.334.993 | *388.283* |
| Tøkur peningur | 215.724.487 | *222.054* |
| | **729.059.480** | ***610.337*** |

# Notur til ársfrásøgnina

| | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| | | | *(t.kr.)* |
| **1.** | **Nettoinntøka** | | |
| | Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, løntakarar | 132.476.166 | *133.021* |
| | Arbeiðsmarknaðareftirlønargjald, arbeiðsgevarar | 119.941.809 | *125.472* |
| | **Nettoinntøka íalt** | **252.417.975** | ***258.493*** |

*Nettoinntøkan – arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið – er fyri løntakarar gjørt upp sum 1,75 % av skattskyldugu inntøkuni fyri 2009 sambært fyribilsskattaskrásetingini, umframt reguleringar fyri inngjøld undanfarin ár. Fyri arbeiðsgevarar er arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldið gjørt upp sum 1,75 % av útgoldnu A-inntøkuni fyri 2009.*

| | | 2009 | 2008 |
|---|---|---|---|
| **2.** | **Avsetingar og tap uppá skuldarar** | | |
| | Broyting í avseting móti tapi uppá skuldarar, arbeiðsgevarar | 0 | *-200* |
| | Strikað krav, arbeiðsgevarar ið ikki skulu gjalda AM-gjald | -1.905.233 | *-1.982* |
| | Avskrivað krav um AM-gjald, arbeiðsgevarar | -196.000 | *-129* |
| | Avskrivað renta, arbeiðsgevarar | -17.289 | *0* |
| | **Avsetingar og tap uppá skuldarar íalt** | **-2.118.522** | ***-2.311*** |
| **3.** | **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti** | | |
| | Vinningsbýti partabrøv | 1.723.856 | *1.926* |
| | Staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 8.809.966 | *-23.678* |
| | Staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 412.446 | *-961* |
| | Handilskostnaður | -300.808 | *-417* |
| | **Staðfestur kursvinningur/tap og vinningsbýti íalt** | **10.645.460** | ***-23.130*** |
| **4.** | **Ikki staðfestur kursvinningur/tap** | | |
| | Ikki staðfestur kursvinningur/tap partabrøv | 14.339.156 | *-2.198* |
| | Ikki staðfestur kursvinningur/tap lánsbrøv | 66.375 | *1.771* |
| | **Ikki staðfestur kursvinningur/tap íalt** | **14.405.531** | ***-427*** |
| **5.** | **Rentuinntøka** | | |
| | Renta av arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldi, arbeiðsgevarar | 113.623 | *118* |
| | Renta av lánsbrøvum | 16.438.457 | *15.541* |
| | Renta av innistandandi | 13.569.508 | *10.651* |
| | **Rentuinntøka íalt** | **30.121.588** | ***26.310*** |

| | 2009 | *2008* |
|---|---|---|
| | | *(t.kr.)* |
| **6. Áogn** | | |
| AM-gjald fyri gomul ár, arbeiðsgevarar | 1.153.534 | *781* |
| AM-gjald fyri roknskaparárið, arbeiðsgevarar | 4.416.434 | *4.515* |
| AM-gjøld løntakarar | 12.530.937 | *11.927* |
| Avsett móti tapi | -1.400.000 | *-1.400* |
| **Áogn íalt** | **16.700.905** | ***15.823*** |

| | | |
|---|---|---|
| **7. Eginogn** | | |
| Eginogn primo | 640.461.339 | *542.107* |
| Ársúrslit | 119.661.754 | *98.354* |
| **Eginogn ultimo** | **760.123.093** | ***640.461*** |

**8. Møguligar aðrar skyldur**

Tað áhvíla ikki grunninum aðrar møguligar skyldur, herundir borgs- og ábyrgdarskyldur, enn tær, sum eru nevndar í ársfrásøgnini.